LM-072/2025

FYLGISKJAL 9

Tórshavn, 23. oktober 2025

Hoyringssvar frá Javna

Viðvíkjandi uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (berarakanningar)
Tórshavn, oktober 2025

Inngangur

Javni takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskotið um berarakanningar. Sum áhugafelag fyri fólk við menningartarn og teirra avvarðandi ynskir Javni at seta sjóneykuna á etisku, sosialu og menniskjansligu síðurnar av uppskotinum. Vit ásanna, at tøknin gevur nýggjar møguleikar, men vit eiga samstundis at spyrja: *Hvørjum tæna vit, og hvørjar avleiðingar fær tað fyri hugburðin til lív og virði hjá fólki við breki?*

Grundsjónarmið

Hvørt einstakt fólk er serstakt.
Øll – uttan mun til brek – hava sama rætt til lívið og sama virði.
Fólk við menningartarni hava grundleggjandi tørv og rættindi eins og onnur, og samfelagið hevur skyldu at veita hvørjum einstøkum tann stuðul, hann ella hon hevur tørv á.
Tað eru umstøðurnar og samfelagið, sum skapa forðingarnar – ikki menniskjað sjálvt.

Etisk og samfelagslig atlit

Berarakanningar hava stóran týdning, men tær hava eisini dýpri etiskar avleiðingar.
Tær kunnu ávirka, hvussu vit fata lívið hjá fólki við breki og í longdini eisini, hvussu samfelagið metir um virðið av hesum lívi.
Tað hevur verið sagt av foreldrum, sum hava børn við t.d. trisomi, og øðrum líknandi breki, at tað er ikki barnið, sum er trupulleikin, men umstøðurnar rundan um.

Sambært Sáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum um rættindi hjá fólki við breki (UNCRPD) skal samfelagið arbeiða fyri, at fólk við breki kunnu liva virðiligt lív við javnbjóðis rættindum – og ikki at forða teimum í at verða til.

Álvarslig brek og óheft ráðgeving

Javni ásannar, at tær arvarligu sjúkur, sum berarakanningin fevnir um, kunnu vera sera álvarsligar og hava stórar heilsuligar og sosialar avleiðingar fyri familjurnar.
Tí er tað týdningarmikið, at foreldur fáa eina *óhefta, fakliga og etiska ráðgeving*, sum gevur teimum møguleika at taka eina væl grundaða avgerð, ikki grundað á ótta ella sosialt trýst, men á vitan og virðing fyri lívinum.
Slík ráðgeving eigur at fevna bæði um læknaligar og menniskjansligar síður, og eisini geva rúm fyri røddum frá fólki við breki og teirra avvarðandi.

Javni vil eisini leggja dent á, at avgerðir um berarakanning og møguligar avleiðingar altíð eru *persónligar og truplar*.
Foreldur, sum velja at bera eitt barn við breki til, skulu ikki verða mistikin fyri at hava valt ein "trupulleika", men skulu verða møtt við virðing og stuðli.
Samfelagið hevur ábyrgd av at skapa karmar, har øll børn – eisini tey við breki – kunnu vaksa upp við tryggleika, kærleika og javnbjóðis møguleikum.
At velja lívið til eigur ikki at hava sosialar ella fíggjarligar avleiðingar fyri familjuna.

Cerebral Paresa sum dømi

Hóast Cerabral Paresa ikki er nevnt í berarakanningini, vil Javni koma við einum dømi við hesari sjúku kortini. Nýggjari granskingar, at Cerebral Paresa (CP) møguliga uppstendur longu í móðurlívi, men umfatar sera ymisk stig av rørslu- og menningartarni.
Hetta vísir, at CP er eitt breitt hugtak.
Hjá nøkrum er CP sjónligt – t.d. við gongutrupulleikum ella rørslutarn – meðan tað hjá øðrum er ósjónligt og kemur til sjóndar sum troyttleiki, ójavnvág ella trupulleikar við sansing og fokus.
Lívsgóðskan kann tó verða høg, hóast ein hevur eina skaða frá føðing.

Tí eigur ein berarakanning ikki at verða sett fram sum eitt amboð til at fyribyrgja "breki", men sum ein møguleiki fyri at skilja og stuðla familjum á ein etiskan og ábyrgdarfullan hátt.

Óvissan um framtíðina

Hvat vit í dag fata sum brek, kann broytast í framtíðini.
Tøkni, viðgerðarhættir og samfelagslig viðurskifti flyta seg skjótt, og tað sum í dag verður hildið at vera ein avmarking, kann í framtíðini verða eitt liviligt lív við stuðli og tøkni.

Tí eigur varsemi at verða víst, áðrenn vit seta í verk eina skipan, sum í roynd og veru kann ávirka lívsrættin hjá fólki við breki.

Tilmæli frá Javna

1. At berarakanningar verða knýttar at greiðari vegleiðing um etisk og sosial viðurskifti.
2. At foreldur fáa óheft, fakliga og humana rættvísa vegleiðing – eisini frá umboðum fyri fólk við breki.
3. At upplýsingar um berarakanningar ikki verða lagdar fram á ein hátt, sum ger, at lívið hjá fólki við breki verður metið sum minni virðiligt.
4. At arbeiðsbólkur verður settur at tryggja, at UNCRPD verður fylgd í øllum stigum av arbeiðinum.
5. At fólk sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru ella hava veri rakt av hesum sjúkum, vera hoyrd í hesum málinum, og ikki spurd umvegis felag teirra.

Avslutningur

Javni ynskir eitt samfelag, har øll hava rætt til lívið og møguleika at menna seg eftir egnum fortreytum – ikki eitt samfelag, har vit velja burtur tey, sum eru øðrvísi.
Tí mælir Javni til, at berarakanningar verða skipaðar við varsemi, fakligheit og virðing fyri menniskjansligari fjølbroytni.